NÝGGJASTU HAGTØLINI
UM FØROYSKA SAMFELAGIÐ
– við enskum undirteksti

Ein sera hent handbók hjá øllum, ið fáast við at kanna og viðgera føroyska samfelagið.

Fløgan
Sum nakað nýtt hevur fløgan í ár eisini allar talvur í excel-sniði. Hetta ger tað munandi lættari at arbeiða við tølunum á telduni.






Føroya Skúlabókagrunnur
www.fsg.fo






Nú kunnu børn við Bassakontu fáa eina jólahosu við góðgæti frá Bassa.

Kom inn á gólvið. Vit gleða okkum at síggja teg.

FØROYA SPARIKASSI


# Teir funnu Harran umborð

**Fyrsta bókin hjá Svenningi av Lofti í røðini um menn, sum komu til trúgv umborð á føroyskum fiskiskipum, er nú at fáa**

BÓKAÚTGÁVA
*Eirikur Lindenskov*

– Altíð havi eg kent tað vera sera hugtakandi at hoyra menn greiða frá, tá ið teir umborð á føroysku sluppum, trolarum, línubátum og øðrum skipum sótu á møti í lugarinum, kahúttini ella messuni og har hoyrdu skipsfelagar sínar boða evangeliið um jesus Kristtus – og at teir sjálvir tóku lut í hesum boðskapi og komu heim aftur til síni kæru sum umbroytti menn.

Soleiðis greiðir Svenning av Lofti frá í nýggju bók sini, »Tað hendi umborð«, sum her hini fyrsti í eini røð, ið nemur við andaliga lívið umborð á fiskiførum okkara aftur í tríatiárini.

– Petur Háberg plagdi ofta at siga við meg, eftir at hann hevði hoyrt vitnisburð frá monhum, sum vóru umvendi umborð á skipum, at hann ætlaði sær at skriva eina bók um hesar menn, greiðir Svenning av Lofti frá.

– Men Petur náddi ikki at skriva bókina, men eldhugi og orð hansara um slíka bók hava livað í mær alla tíðina og skundað undir hetta verið, sigur Svenning av Lofti.

Onnur orsøk er, at pápi Svenning, Jóan petur Poulsen, á Lofti, var ein av hesum mongu føroysku fiskimonnum, sum komu til umvendingar umborð – og var tað umborð á »Lilie« undir Grønlandi í 1937 – og hevur Svenning vígt bókina minninum um pápan.

Svenning av Lofti tekur eisini til Jákup Oluf á Lakjuni í Fuglafirði, sum eisini kom til trúgv á Frelsaran úti á havinum.

– Hann plagdi at siga, at »tað hava verið nógvir flótandi møtisælir í Føroyum«, sigur Svenning av Lofti.

Ætlanin hjá Svenningi við hesi bókarøðini er at lata eitt íkast, sum varpar ljós á ein higartil lítið kendan part av Føroya siglingarsøgu. Bókin er prentað í 2500 eintøkum, oghon kostar 275 kr.




*Svenning av Lofti við nýggju bókini um menn, sum komu til trúgv umborð á føroyskum fiskiskipum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*








*Sosialurin fer at halda til í kommunuhúsunum í Sandavági*

Dagin fyri at Vágatunnilin letur upp:

# Sosialurin letur upp redaktión í Vágum

FJØLMIÐLAR
*Jan Müller*

Mánadagin 9. desember, dagin fyri søguligu hendingina í Vágum, tá fyrsti undirsjóvartunnilin í Føroyum, letur upp, letur Sosialurin upp nýggja redaktión í Vágum. Blaðið hevur leigað høli frá Sandavágs kommunu, í vøkru og hugnaligu kommunuhúsunum í bygdini, har kommunan heldur til umframt at læknaviðtala og sjúkrakassi eru í húsunum.

Tað verður blaðmaðurin, Edvard Joensen, sum fer at manna nýggju redaktiónina. Við nýggju tøknini, sum blaðfólk í dag hava atgongd til og tí góða samskiftinum, er lagamanni at hava blaðredaktiónir kring landið. Hetta er so eisini í tráð við strategiina hjá Sosialinum: at gerast meira sjónligur kring alt landið við at hava blaðfólk, sum bæði búgva og kunnu arbeiða á staðnum.

Ætlanin við hesum tiltakinum er at kunna nøkta tørvin á tíðindum og ymsum fjølmiðlatænastum í oynni so nógvar dagar á árinum tilber. Fólk í oynni, sum hava brúk fyri at lata inn lesarabrøv, heilsanir, lýsingar ol. kunnu so venda sær beinleiðis til redaktiónina í Sandavági.

Við hesum tiltakinum hevur blaðið nú umframt høvuðsredaktiónina á Argjum eisini redaktiónir í Suðuroynni, Norðoyggjum og Eysturoynni.

Sum knútapunkt millum Føroyar og umheimin hevur Vágoyggin sera stóran samfelagsligan týdning umframt at oyggin er ein livandi og týðandi partur av Føroyum.

Í sambandi við upplatingina av hesi 4. lokalredaktiónini hjá Sosialinum verður móttøka í blaðhølunum í Kommunuhúsunum í Sandavági mánadagin 9. desember frá klokkan 16 til 18.



*Sum knútapunkt millum Føroyar og umheimin hevur Vágoyggin sera stóran samfelagsligan týdning umframt at oyggin er ein livandi og týðandi partur av Føroyum. Tí er tað týdningarmikið at hava blaðdeild í oynni*


Móttøka
Sosialurin letur upp redaktión í Vágum





Í sambandi við at Sosialurin letur upp redaktión í Vágum verður almenn móttøka á nýggju blaðdeildini í Kommunuhúsinum í Sandavági mánadagin 9. desember frá klokkan 16 til 18.

Øll eru vælkomin.

Sosialurin

Teir tóku land 7
Føroyingar í Grønlandi

"Teir tóku land" sýnir seg hesaferð um føroyskan útróður og fiskavinnu í Grønlandi í seksatiárunum.

Flakavirkið hjá Nordafar fór nú at taka móti fiski úr Grátufjørðinum, Tovkussak og báðum havnunum í Ravnsoynni.

Allir útróðrarmenninir løgdu um frá saltfiski til feskfisk. Samvinnufelagið gavst at samskipa útróður í Grønlandi.

Saltfiskamenninir í Kangarsuk og Borgshavn stovnaðu egið felag. Grønlandsfelagið bygdi eina nýggja røð av dekkbátum til útróður í Føroyingahavnini.

Gerandisdagurin hjá útróðrarmonnum verður lýstur, og greitt verður frá, tá ein føroysk genta hvarv í Grátufjørðinum.

Frásøgn er um kendasta føroyingin í Grønlandi, sum var skipari á grønlendska hvalabátinum "Sonja".

Fullfíggjað yvirlit er yvir allar útróðrarmenn.







Jógvan Arge